


FÓLKATINGSVALIÐ 13. NOVEMBER 2007 LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008




# Hesum fari eg at virka fyri á Fólkatingi



Val

HELENA DAM Á NEYSTABØ
Javnaðarflokkurin

Føroyar skal miða eftir at vera ein sjálvberandi tjóð bæði búskaparliga, mentanarliga og stjórnarskipanarliga. Uppskotið hjá Javnaðarflokkinum um eina sjálvstýrislóg er eitt frálíkt grundarlag. Hetta uppskot ásetur, at sjálvstýrislógin skal staðfesta ein samstarvssáttmála – ein samveldissáttmála, sum tvey sjálvstøðug og javnsett lond í ríkisfelagsskapi hvørt við annað.

Fólkatingssessurin skal brúkast til at slóða fyri einum felagsskapi millum Føroyar og Danmark á jøvnum føti. Einum frælsum felagsskapi, sum gevur Føroyum møguleika fyri at virka sjálvstøðugt millum onnur lond. Er grundlógin ein forðing fyri hesum, ja, so má hesin spurningur loysast við støði í tí arbeiði, sum stjórnarskipanarnevndin hevur gjørt. Endamálið er at Føroyar kunnu samstarva á jøvnum føti við øll heimsins lond.

Sannleikin er, at allar yvirtøkur, ja øll framstig á sjálvstýrisleið eru tikin av Javnaðarflokkinum og saman við Javnaðarflokkinum. Og listin er langur. Eingin gloymir undirgrundina og yvirtøkulógina.

Tíverri mugu vit siga, at eisini hetta seinasta valskeiðið hava okkara fólkatingsumboð drigið føroyskar ósemjur niður á røðarapallin í Fólkatinginum, og fløkt føroyskan og danskan politikk saman, heldur enn at slóða fyri semjum.

Til tess at røkja føroysk áhugamál í Fólkatinginum er tað ein fyrimunur at vita, hvussu tann politiska skipanin virkar, bæði í Føroyum og í Danmark. Frá nógvum samráðingum millum landsstýrið og donsku stjórnina, sum løgtingskvinna, sum landsstýriskvinna, sum eygleiðari í bankakanningini, havi eg drúgvar royndir at byggja á, tá ið Føroyar skulu setast á dagsskrá í Danmark og úti í heimi. Fái er veljarans álit, skal eg gera mítt besta til tess at røkja áhugamál føroyinga.

**Føroyar og ES**

Danir fara um stutta tíð at samtykkja ein nýggjan ES-sáttmála. Hesin sáttmáli hevur verið samanborin við eina nýggja felags grundlóg fyri limalondini í ES, har danir eins og onnur fólk mugu geva sjálvsavgerðarrætt frá sær. Ein slíkur sáttmáli kann tí eisini viðføra, at felagsmál millum Føroyar og Danmark verða flutt til Bryssel.

Hetta er eitt álvarsmál fyri Føroyar, og fólkatingssessurin skal brúkast til at fyribyrgja, at føroyskur sjálvsavgerðarættur verður avreiddur til Bryssel. Ein føroyskur fólkatingslimur skal fylgja væl við, og arbeiða fyri at varðveita og menna ta serstøðu, sum vit hava í ríkinum og í Evropa.

**Gongdin má vendast**

Hagtølini siga, at nógvar kvinnur eins og nógv vælútbúgvin fólk trívast ikki í Føroyum. Orsøkirnar eru mangar. Tað snýr seg bæði um vantandi vælferðartænastur - hjá til dømis einligum mammum, og førleikaskerdum. Men tað snýr seg ikki minst um vantandi arbeiðs- og menningarmøguleikar hjá fólki við serligum førleikum.

Samfelagið hevur stóran tørv á kvinnunum. Longu nú eru uml. 2.000 færri kvinnur enn menn. Hugsið um avleiðingarnar, um gongdin heldur fram. Hagtølini siga nevniliga, at tað eru kvinnur í aldrinum millum 20 og 39 ár, sum velja Føroyar frá.

Vit hava so sanniliga eisini brúk fyri teimum væl lærdu. Vinnulívið, heilsuverkið útbúgvingarskipanin og ikki minst mentunarlívið - øll rópa eftir væl útbúnum fólki, kreativum fólki og fólki við fjølbroyttum royndum. Fólki, ið kunnu opna dyr.

Hetta er ein katastrofal gongd, sum sigur okkum, at vit mugu styrkja samhaldsfestið og fjølbroytnið og tora at taka lut í alheimgerðini.

Tað má ikki vera snævurskygni og ósolidariskar skipanir, ið gera, at føroyskar kvinnur og vælútbúgvið fólk velja ikki at búseta seg í Føroyum. Vit skulu í góðum samstarvi við Danmark og onnur lond menna okkara samhaldsføstu skipanir, so at trivnaður og vælferð er á hægsta stigi í Føroyum. Í tann mun at eitt fólkatingsumboð kann geva eitt íkast til at venda gongdini, fari eg at leggja alla mína orku í tað.

**Politikkur uttan landamørk**

Vit vita øll, at tær stóru politisku dagsskráirnar verða ikki loystar í teimum einstøku parlamentunum. Eg hugsi t.d. um veðurlagsbroytingar, umhvørvi, gransking og altjóðaagerð.

Spilloljan, CO2 dálkingin, umhvørvisdálkingin og ódnarveðrini spyrja ikki eftir landamarki, tá ið rokningarnar verða sendar út. Og rokningarnar verða stórar - gera vit einki. Eisini skulu vit taka lut í teirri slóðbrótandi granskingini, sum skal vísa á nýggja og burðardygga menning hjá t.d. vinnulívinum. Her megnar eingin at gera nakað einsamallur. Og als ikki Føroyar. Gud náði okkum, um vit liggja sjóvarfallið av okkum.

Vit eru kanska smá og fá, men landafrøðiliga eru vit fleiri ferðir størri enn Danmark. Lata vit sum einki og uppfinna tápuligar undanførslur í t.d. Kyoto-málinum, so verða avleiðingarnar ógvusligar – eingin ivi um tað. Tað liggur ein stór ábyrgd á okkara fólkatingumboðum at vera við til at finna burðardyggar loysnir saman við Danmark og øðrum londum.

Okkara fólkatingsumboð skulu miðvíst saman við landsstýrinum arbeiða fyri, at Føroyar fáa umboðan í so nógvum altjóða felagsskapum sum møguligt. Men meðan vit arbeiða fyri hesum, má framburðurin halda fram. Tað ber ikki til at steðga t.d. Koyto-málinum, bert tí onkur flokkur ikki góðtekur, at vit boða ST frá støðu okkara gjøgnum Danmark. Tað merkir bert, at vit halda fram at dálka.

**Tað eru úrslitini sum telja**

Minnist til, at tað tekur tíð og krevur politiskt hegni at røkka úrslitum. Tí má eitt føroyskt fólkatingsumboð verða fólkatingsumboð burturav. Ikki eitt umboð ið gravar seg niður í Danmark, men eitt vakið og virkið umboð, ið tænir Føroya fólki.

Fái er veljarans álit, skal eg gera mítt besta til tess at røkja áhugamál føroyinga.

# Týsdagin flyta vit mørk



Val

EYÐGUNN SAMUELSEN
Javnaðarflokkurin

Fólkatingsvalið týsdagin er eitt gott høvi hjá øllum kvinnum at vísa, at nú vilja vit luttaka meira virknar í fólkaræðinum enn higartil, nú skal tað vera.

Fyrsta stigið er tikið. Vit hava hoyrt á nógv ár, at kvinnur vilja ikki stilla upp. Til hetta fólkatingsvalið hava vit sæð, at hetta er ikki so, ongantíð áður hava so nógvar kvinnur úr øllum flokkum latið seg stilla upp.Tað er enntá so, at tað eru lutfalsliga fleiri kvinnur uppstillaðar til hetta valið í Føroyum, enn í Danmark.

Tað er nú upp til tykkum at vísa teimum álit við at seta kross við eina kvinnu.

Lat okkum vísa at kvinnur stuðla kvinnum og harvið vísa okkara politikarum og øllum Føroya fólkið, at nú má gongdin vendast.

Vit meina í fullum álvara at vit vilja eisini síggja kvinnur í øllum størvum í samfelagnum, eisini í politikki, á jøvnum føti við menn. Kvinnurnar skulu vera ein natúrligur viðspælari, allastaðni har avgerðir vera tiknar, so vit fáa betri grundaðar avgerðir og eitt betur samfelag fyri okkum øll.

Góði veljari stuðla tit kvinnum til fólkatingsvalið týsdagin, so kunnu vit róliga siga, latið bara løgtingsvalið koma !

# Sambandsfloksins aðalmál: At menna land og fólk okkara í ríkisfelagsskapinum



Val

JOHAN DAHL
Løgtingsmaður
Sambandsflokkurin

Valið hjá tær er einfalt - vil tú hava ein ábyrgdarfullan flokk at umboða tíni og landsins áhugamál á fólktingið - ein flokk sum áhaldandi vil mennað hetta samfelag og fólkið her búleikast, so er sambandsflokkurin TÍN flokkur.

Sambandsflokkurin er TÍN TRYGD ,TÍN VERJA ,TÍN ábyrgdarfullað umboðan bæði her heima á løgtingið og í fólkatinginum.

Tí er umráðandi at vit fáa júst tína atkvøðu tann 13. Novembur.

# Hvør selur seg í politikki?



Val

HØGNI HOYDAL
Tjóðveldi

Tað er sjálvsagt funnin fressur hjá fleiri at leggja Tjóðveldi undir at vilja selja seg til hægstbjóðandi í sambandi við fólkatingsvalið. Enntá tosar Løgtingsformaðurin um "politiska prostitusjón".

Nokk so skemtiligt, at hoyra slíkar ákærur frá júst teimum flokkum, sum seinastu 70 árini hava prógvað, at teir eru longu keyptir inn í danskar flokkar. Og sum aftur til hetta valið boða frá, at teir uppá forhond hava selt sínar atkvøður til ávísar flokkar í Danmark.

Men eisini nokk so álvarsligar ákærur, sum krevja eitt aftursvar.

Sambandsflokkurin, sum annars atkvøddi ímóti Irakkrígnum og hernaðarlógunum í Føroyum, vil altso fegin leggja atkvøður til ta stjórn, sum framdi hetta.

Fólkaflokkurin sigur seg eisini frammanundan stuðla eini danskari stjórn, hóast hon gongur beint ímóti samdum løgtingi.

Og javnaðarflokkurin hevur frammanundan selt sín loyalitet til donsku socialdemokratarnar.

Tað, sum vit hava sagt í Tjóðveldinum, er, at vit ikki selja okkum til nakran flokk.

Men vit siga, at gerst okkara atkvøða avgerandi og ger munin (uttan mun til um vit siga ja, nei ella hvørki), so hava vit nøkur heilt greið krøv, sum hava við rættindini hjá føroyska fólkinum at gera:

- At okkara rættindi sum tjóð verða fráboðað Sameindu Tjóðum, so viðurskiftini millum Danmark og Føroyar verða skipað eftir altjóða reglum og sáttmálum.
- At rættindi okkara at samtykkja egna grundlóg, verða vird.
- At vit hava rætt til javnar samráðingar eftir altjóða reglum um okkara framtíðarstøðu.

Hetta eru krøv, sum allir flokkar og øll í Føroyum áttu at kunna tikið undir við.

Hetta hevði lagt fólkaræðisligu mannagongdirnar greiðar Og við hesum verða avgerðirnar ikki tiknar í Keypmannhavn eftir donskum krøvum, men í Føroyum eftir altjóða demokratiskum reglum.

Vit eiga sjálvsagt at brúka ein slíkan møguleiki, har vit júst ikki selja okkum, men hinvegin hava greið krøv.

Samstundis hava vit gjørt greitt, at vit hava sjálvsagt eisini politisk og hugsjónarlig mørk fyri at nýta okkara atkvøðu. Og markið gongur sjálvsagt júst har, ið vit gera okkum inn á grundleggjandi rættindi hjá øðrum fólkum – um tað er í altjóða høpi ella í Danmark.